


*Barnagrandprix er eitt afturvendandi tiltak, sum er sera vælumtókt, men nógv foreldur hava verið sera vónbrotin av mannagongdini í ár*

# Foreldur vónbrotin eftir barnaprix

**Foreldur í Vágum eru sera vónbrotin eftir Nósa Barnagrandprixið á Vestanstevnu. Tríggir luttakarir vórðu úr Havn, hóast onkur úr Vágum ikki slapp við, siga tey. James Olsen heldur ikki nakað skeivt er farið fram**

BARNAGRANDPRIX
*Marjun Dalsgaard*

Nósa Barnagrandprix hevur verið væl móttikið, síðan tað byrjaði fyri slakum tveimum árum síðani. Eisini foreldur í Vágum hava verið sera glað fyri tiltakið, men í ár var stemningurin ikki góður eftir kappingina á Vestanstevnu. Ein av orsøkunum er, at heili tríggir luttakarir vóru úr Havn, og hetta hóast at okkurt barn úr Vágum ikki slapp við.

- Tað er eingin ivi um, at tær sum vórðu nummar eitt og tvey vóru tær, sum sungu best, sigur Gitte Samuelsen, sum hevði ein son við í kappingini.

- Men tað kann tykjast eitt sindur órættvíst, at tiltakið verður fyriskipað sum ein lokal kapping, og fleiri luttakarir eru úr Havn, leggur hon aftrat. Umframt sonin hevði dótturin eisini meldað seg til, men hon fekk ikki boð um at koma við. Tí kendist tað sera løgið, tá tað frá pallinum varð boðað frá, at luttakarir úr Havnini vóru við, av tí at undirtøkan ikki var nóg stór lokalt.

Ein av fyrireikarunum, James Olsen sigur, at hann ikki hevur kannað málið, men at tað er sera løgið, um nakar ikki er sloppin við.

- Tað er vanligt, at børn aðrastaðni frá luttaka, um undirtøkan ikki er nóg góð, og eg kenni einki til, at nakar ikki er sloppin við - hinvegin hava vit við nógv børn at gera, og tað kann henda eitt mistak. Um hattar passar, eri eg sera keddur um tað, men so vítt sum eg veit, passar tað ikki, sigur James Olsen. Hin fyrireikarin Mark Joensen sigur, at tað má vera tí, at tey hava meldað seg ov seint, hann dugir ikki at síggja nakra aðra orsøk til, at nakað barn, sum hevur meldað seg til ikki er sloppið við.

- Vit fingu at vita, at vit høvdu manipulerað við lutakastinum, tí børnini, sum komu úr Havn eru so dugnaligir sangarir, men hettar er heilt burturvið, sigur Mark Joensen, og

### Verður flutt

Eitt annað sum foreldrini har vesturi eru vónbrotin av, er, at Grandprixið verður hildið á Vestanstenvnu, tá tey hava nógv um oyrini og ikki hava tíð til at vera hjá børnunum. Ein av teimum er Hansina á Plógv, sum hevur verið sera glað fyri tiltakið annars, men heldur, at tað var eitt vónbrot í ár.

- Tað hevur verið sera mennandi fyri børnini og tey fá gott sjálvsálit av tí, men í ár lá tað sera illa fyri, tí tað lá á Vestanstevnu, sigur hon.

Úrslitið varð, at einsans 150 fólk vóru og lurtaðu. Seinast vóru umleið 350 fólk.

James Olsen heldur, at foreldrini eiga at geva teimum ein kjans, tí tiltakið er nýtt, og tey royna enn at finna rætta stevið. Annars hevur hann ikki hug til at viðmerkja kvøldið á Vestanstevnu, tí hann var ikki til staðar, sigur hann.

Tað var Mark Joensen, og hann sigur tað vera avgjørt, at kappingin ikki verður á nakrari stevnu næsta ár, og helst heldur ikki um summarið.

- Nú skulu vit hava bæði bein á jørðini, og ikki oyðileggja alt fyri børnini, vit broyta tað bara, og so verða øll glað. Vit fingu at vita frá foreldrunum, at hetta var bert ein pengamaskina. Sjálvsagt vilja vit vinna pengin, annars kann tiltakið ikki yvirliva, men tað handlar fyrst og fremst um børnini – at geva teimum møgileika fyri at menna seg, sigur Mark Joensen.

# Regatta í Sundalagnum

**Tann 8. og 9. august er aftur regatta í Sundalagnum og endað verður á Ovastevnu í Nólsoy**

REGATTA
*Dagfinn Olsen*

Eins og undanfarin ár verður aftur regattasigling í Sundalagnum í ár. Av Eiði til

Hósvíkar 8. august og úr Hósvík tll Ovastevnu í Nólsoy 9. august. Tað er væl umtókt at taka lut í hesi regattasiglingini og luttakararnir eru afturvendandi, men tað legst eisini afturat.

Luttakarar koma úr øllum landinum, eitt árið kom ein heilt úr USA í seglbáti og kanska kemur ein sama teinin í ár. Mong snið av bátum, førum, hava tikið lut, alt frá kappróðrarbátum, motorbátum til kajakkir og vatnskutarar.

Lagt verður frá landi á Eiði klokkan 19 og stillisliga verður siglt ígjøgnum Sundalagið, steðgað verður á Norðskála ar rinda møðina og sløkkja tostan og hildið verður fram til Hósvíkar. Har er møguleiki at fáa tjaldpláss og heitur matur er at fáa í bygdarhúsinum.

Samarittar hava eftirlit við gestunum og serstakliga bátahylinum.

Leygardagin eftir døgurða verður farið víðari til Nólsoyar á Ovastevnu.

Luttøkugjaldið er 100 krónur pr. persón við heitum mati og morgunmati. Eisini fáa luttakarar eina serliga regatta T-shirt, sum Bátatænastan, SkrettingFøroyar, Fluggur hjá Fróða og Føroya Sparikassi lata.

Tilmelding fer fram á telefon 210186, 221418 og 220385 og á heimasíðuni hjá Klaksvíkar Róðrarfelag: www.krf.fo ella telduposti á regatta@kallnet.fo, siga fyrireikararnir í Hósvíkar Róðrarfelag í tíðindaskrivi.





# Nýggja dansistaðið endað í Oljumálaráðnum

**Høgni Danielsen hevur kært Tórshavnar Kommunu fyri Oljumálaráðið. Eigarin av skeytinum, har Kvøldlot í sínari tíð helt til, kærir Tórshavnar Kommunu fyri at sýta honum at byggja hóskandi ventilatiónshús, og at kommunan hevur latið byggivaldið til grannarnar**



*Byggingin av nýggja dansi- og matstovustaðnum, Maxim og Royal Club, hevur ligið still síðan oktober mánáð í fjør. Orsøkin er støddin á ventilatiónshúsinum, sum Tórshavnar Býrað ikki góðkennir. Eigarin, Høgni Danielsen hevur sent fleiri nýggj uppskot um ventilatiónshús, men øll eru víst aftur, og nú er málið endað í Oljumálaráðnum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

BYGGIMÁL
*Páll Holm Johannesen*

Nú eru eftir hondini nógv ár liðin, síðan tíðindi gingu um, at Høgni Danielsen skuldi verða klárur við einum nýggjum bygningi á staðnum,har dansistaðið, Kvøldlot, helt til. Ætlanin við nýggja bygninginum hjá Høgna Danielsen er bæði at reka bæði dansi- og matstovustað.

Tá vit koma á gátt at fregnast um, hvussu tað líður við byggingini, møta vit einum frustreraðum Høgna Danielsen. Í løtuni er støðan hon, at hann hevur fingið forboð frá Tórshavnar Býráð at byggja víðari, tí ein tvístøða hevur tikið seg upp viðvíkjandi ventilatiónshúsinum á tekjuni á húsinum.

Síðan farið varð undir nýggja bygningin hava fleiri uppgerðir verið, sum hava havt við sær, at tað hevur gingið striltið við at fáa ferð á byggingina. Høgni hevur verið hóslag við grannar, Tórshavnar Býráð, og nú er málið endað hjá Oljumálaráðnum.

### Ventilatiónshúsið í buktini

Kæran hjá Høgna Danielsen til Oljumálaráðið snýr seg um, at Tórshavnar Kommuna sýtir fyri at loyva Høgna Danielsen at byggja hóskandi ventilationshús á tekjuni, og at Tórshavnar Kommuna hevur latið byggivaldið yvir skeytinum hja Høgna Danielsen til grannarnar.

Tann seinna kæran snýr seg um, at Tórshavnar Kommuna hevur bundið seg til, at grannarnir hjá nýggja bygninginum hjá Høgna Danielsen skulu samtykkja allar umbyggingar við bygninginum. Hetta er sambært eigaranum av skeytinum gjørt í loyndum, og hann hevur als ikki undirskrivað sáttmála, at grannarnir skulu hava slíkt vald yvir hansara bygningi.

– Hetta er ein óhoyrd mannagongd, at Tórshavnar Kommuna bindir seg til grannarnar, um hvussu eg skal fyrihalda meg til mína bygging, men í løtuni er tað so støðan, sigur ein argur eigari.

Høgni Danielsen bygdi upprunaliga ventilatiónshúsið ov stórt, og varð tað kravt honum at umbyggja tað, so hann helt seg byggisamtyktina. Hann hevur síðan í samráð við fleiri verkfrøðingar komin við nýggjum uppskotum um eina umbygging av ventilationshúsinum, men býráðið hevur víst øllum uppskotum aftur. Høgni hevur tí vent sær til Oljumálaráðið. Í kæruni til Oljumálaráðið kemur fram, at grannarnir eisini sýta fyri øllum uppskotum til eitt nýtt ventilatiónshúsið, og tí er ein rættilig naggatódn íkomin

### Heldur fram

Spurdur, um hann framvegis hevur gott treyst við nýggja bygninginum, svarar Høgni Danielsen, at hann hevur ongar ætlanir um at gevast við ætlanini at lata upp dansi- og matstovustað í høvuðsstaðnum.

– Nú bíði eg bara eftir svari frá Oljumálaráðnum um kæruna, og eg vóni tað kemur skjótt, so eg kann taka arbeiðið upp aftur og fáa byggingina frá hondini, sigur Høgni Danielsen.

Í skrivandi løtu hevur arbeiðið ligið stilt síðan oktober mánað í fjør, og Høgni leggur ikki lok á, at núverandi støða er sera kostnaðarmikið, og at tað frustrerandi við allari mótstøðuni, hann møtir við nýggi bygg-ingin.

Ert tú ikki sjálvur høvuðskelda til trupulleikarnir, tá ventilationshúsið upprunaliga varð bygt ov stórt? Jú tað kanst tú væl siga, men eg eri komin við fleiri nýggjum uppskotum, men tey vera øll víst aftur, hóast tey áttu at verði góðtikin. Tá eg ikki komi víðari við býráðnum, havi eg valt at royna meg í Oljumálaráðnum, greiðir Høgni Danielsen frá.

Úr Oljumálaráðnum verður sagt, at málið framvegis verður viðgjørt, og enn ber ikki til at siga nær kæran hjá Høgna Danielsen verður svara aftur, so líkt er til , at naggatódnin millum Høgna og Tórshavnar Býrað heldur fram í eina tíð afturat.

**Fakta**

Fakta: Gamla Kvøldlot

Fyrrverandi dansistaðið, Kvøldlot, var upprunaliga smiðja. Smiðjan hjá Símun Askham varð bygd um aldarskiftið, og smiðjuvirksemið var í bygninginum fram til fyrst í áttatiárunum. Abbasynir hjá Símuni Askham fóru tá undir at reka dansistaðið Kvøldlot.

Kvøldlot var sera vælumtókt dansistað í høvuðsstaðnum, og serliga varð dansistaðið væl vitjað hós- og sunnukvøld. Í 1996 fór Kvøldlot av knóranum, og Høgni Danielsen keypti bygningin. Hann rak dansistaðið í nakrar mánaðaðir, og lat síðani aftur.
Gamli Kvøldlot-bygningurin er síðan tikin niður, og nýggjur bygdur. Ætlanin er at hava bæði dansi- og matstovu í nýggja bygninginum. Dansistaðið skal eita Royal Club, meðan matstovan verður kallað Maxim.

*Hóast mótstøðan kann til tíðir tykjast stór, so hevur Høgni Danielsen ongar ætlanir um at sleppa ætlanin um at lata upp nýtt dansi- og matstovustað í høvuðsstaðnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

